Sosialurin 341800

in.fo



DREYMASTÁRVIÐ
FINNUR TÚ Á
in.fo

TVINGSILSSØLA

Hósdagin 28. juni 2018, kl. 13:15 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir fastognunum matr.nr. 168e, bygn. nr. 1, Vágur og matr.nr. 168g, bygn.nr. 1, Vágur – Bryggjan 13 og 15, 900 Vágur - (AS nr. 2-27/2017 og 2-28/2017).

Talan er um virkisbygning á leigaðum grundøkjum hjá Vágs kommunu, sum hevur verið nýttur til virksemi innan fiskaframleiðslu, harundir turking av fiski.

Fleiri upplýsingar eru í niðanfyri nevndu tvingsilssøluuppstilling.

Tvingsilssølan er umbiðin av Jógvan E. Ellefsen, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 203040 (sak nr. 57684101), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina.

Tvingsilssøluppstilling kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

Føroya Fútarættur,
tann 25. mai 2018.

Peter Flügge
sorinskrivari

PROKLAMA

Búgvið eftir Katrin Løkjá, fødd 290977 – deyð 5. mars 2018, ið búði Svaldbardsvegur 10, 100 Tórshavn og eftirlivandi hjúnafelaga Árant Løkjá, er sambært § 75 í skiftilógini latið arvingunum til privat skifti. Í hesum sambandi verða møguligir kravánarar bidnir um, innan 3 mánaðir frá tí at henda lýsing hevur verið í blaðnum, at senda undirritaða fráboðan um krav teirra viðlagt skjølum, ið prógva rættleikan av krøvum teirra, ávísandi j.nr. 8800518.

Tikið er við skuld.

Tórshavn, tann 28. mai 2018
Petur Even Djurhuus,
advokatur
Yviri við Strond 4
Postsmoga 359
FO-100 Tórshavn

PROKLAMA

Øll, sum hava krøv í búnum eftir Pauli Frederik Knudsen, Stoffalág 84, 100 Tórshavn, føddur tann 08.09.1937, deyður tann 19.03.2018, verða við hesum biðin um innan 3 mánaðar frá kunngerð av hesi lýsing at boða frá og skjalprógva krøv síni fyri undirritaða skiftirætti.

Tikið er ikki við skuld.

Krøv skulu gerast upp pr. deyðsdagin, og sendast til advokat Fríða Patursson, Advokatskrivstovan, Frúutrøð 4, 100 Tórshavn, vísandi til sks.nr. 109/2018, saman við frumriti av teimum skjølum, sum krøvini eru grundað á.

FØROYA SKIFTIRÆTTUR,
tann 11. maj 2018.

TORG

Arbeiði

Vit reinsa og mála tak
Vit kunnu bjóða: Skjótt og gott handverk Drúgvar royndir Ráðgeving Lagaligar prísir Arbeiðsøki Suður Streymoy. Ring um óbindandi tilboð
213990

Stoypa trappu
Tilboð uppá at fáa stoypt eina uttandura trappu ynskist. Er i høvuðstaðarøkinum
536666

Málara arbeiði
Vit átaka okkum alt málaraarbeiði og arbeiða um alt landi. Ring ella skriva til malarin.fo@hotmail.com og fá eitt tilboð uppá uppgávuna.
253766

Bingo

Lutaseðlar fyri minnisvarða í Svínoy
Vinnaratøl: 1)6291 2)4439 3)3345 4)1261 5)6547 6)1149 7)6267 8)2382 9)4374 10)2416 11)0754 12)4545 Vinnarar kunnu ringja til P.S.Olsen
272315

Býli í Føroyum

Íbúð í býti
Íbúð við hava og seinnaparts-sól í Keypmannahavn kann bítast við heim í Tórshavn í nakrar vikur, evt. í juli í ár. Skriva til: edmundjacobsen@yahoo.com ella Facebook: Edmund S. Jacobsen

Hús/Íbúð ynskist til langtíðarleigu
Hús/Íbúð ynskiskt til langtíðarleigu í Streymoynni (norður ella suður) ella Vágum. Alt hevur áhuga.
ibud2211@gmail.com

Íbúð ynskist
Lítil møbelera íbúð og eitt kamar ynskist til leigu. Hels nærhendis býnum. Vinaliga ring
Tlf 593102

Íbúð søkist
Par søkir íbúð í meginøkinum, roykja og drekka ikki. Gjalda til tíðina
Tlf 529056

Samband

Samband
Jag er en eldre dame, som er enke nogle par år. Jeg ønsker at få samband med en herre. Jeg er alene, han skal ikke bruge spiritus og ikke røge. Jeg håber der er enteresse, svar snart. Skriva til Sosialurin Bill.Mrk. 11,05,18 Tórsgøta 1 100 Tórshavn
Bill.Mrk 11,05,18

Út- & Sjónvarp

LEIGA FLATSKERM VIÐ KEYPSRÆTTI
LEIGA 43 FLATSKERM VIÐ KEYPSRÆTTI. EINKI ÚTGJALD. ÓKEYPIS ÚTKOYRING UM ALT LANDIÐ. ÚR 260,-KR MÐR.
RADIOVERKSTAÐIÐ 251160


TÓRSHAVNAR KOMMUNA



Nýggj serstøk byggisamtykt við Villingardalsvegin, Tórshavn

Tórshavnar býráð samtykti á fundi 24. mai 2018 uppskot um nýggja serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1345a, 1346a og 1347a við Villingardalsvegin, sum hevur 35 grundstykkir til stakhús, umframt fríøki, gøtusamband, felags p- pláss o.a.

Økið liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og av tí at grundstykkini eru undir 500 m2 til støddar, verður serstøk byggisamtykt gjørd fyri økið.



Tilfar, sum lýsir uppskotið um nýggju serstøku byggisamtyktina við Villingardalsvegin, liggur frammi á torshavn.fo/byggisamtyktir og í Snarskivuni frá 28. apríl 2018 til 9. juli 2018.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga til torshavn@torshavn.fo í seinasta lagi 9. juli 2018.

torshavn.fo/byggisamtyktir